# HIGARTIL ÓKENDUR SNIGIL FUNNIN Í FØROYUM

***við Jens-Kjeld Jensen, fuglaútstappara, Nólsoy.***

Herfyri sendi Dagfinn Højgaard mær nakrar sniglar, sum hann hevði funnið á Svangaskari á Toftum. Hann helt ikki, at teir líktust morsniglinum (dreparasniglinum), og tað var eg fulkominliga samdur við honum í!
Sniglarnir hann hevði funnið, høvdu sera vakurt mynstur, og vóru eisini sera vakrir á liti. Vegna tað, at eg ongantíð hevði sæð tílíkar sniglar áður, setti eg meg í samband við norðmannin Torstein Solhøj, sum samlaði sniglar í Føroyum fyri umleið 25 árum síðani.
Teir flestu sniglar kunnu verða sera ymiskur á at líta, hóast teir eru av sama slag, og tí er tað ofta torført at eyðmerkja slagið. Torstein Solhøj kundi tó beinanvegin greiða mær frá, at hesir hoyrdu til slagið Limax macimus, sum á norskum eita Boasnegl.
Um mann hyggur í tey ymisku tíðarritini, verða hesir sniglar av slagnum L. macimus ofta kallaðir "leopardsnigil", men sambært Dagfinn Højgaard hava bert 5 % av teimum blettar – hini 95 % hava strípur, so helst hevði tað verið betur at funnið eitt meira hóskandi føroyskt navn til teir.
L. macimus er heldur tynnri, við einum spískari afturparti enn morsniglin, og tí er lætt at kenna mun á teimum. Morsniglen er ofta bert 6-12 cm. til longdar, meðan L. macimus kan verða einar 20 cm. til longdar. Annars kunnu áhugaði lesa eina grein um morsniglilin í Frøði nr. 1/2003.
L. macimus finst sjáldan uttandura oman fyri breiddarstigið 61o N. Og Dagfinn Højgaard viðmerkti eisini, at hann bert hevði sæð henda snigilin tey lýggju kvøldini.
L. macimus finst millum annað í Suðurnoregi, Suðursvøríki, Danmark, Írlandi og í Onglandi.

Hvussu leingi L. macimus hevur hildið til á Svangaskari, er ikki gott at vita; men helst hevur hann verið har í nøkur ár.
Vegna tað, at havafólk sjáldan eru sniglaserfrøðingar, er ikki óhugsandi, at tey stundum kunnu hava tikið feil, og hava hildið L. macimus verið morsnigil.
Sambært Dagfinni Højgaard hevur eingin heldur havt nakrar trupulleikar av L. macimus við Svangaskar um vit samanbera við trupulleikarnar, ið fólk hava av morsniglinum!

Eg eri sera áhugaður í at hoyra frá fólki, ið hava sæð henda snigilin Limax macimus, sum møguliga er vanligur aðra staðni í Føroyum?

(framhald)

## SNIGLAR

***við Jens-Kjeld Jensen, fuglaútstappara, Nólsoy.***

Tann 25. september høvdu vit eina grein í Dimmalætting við yvirskriftini "HIGARTIL ÓKENDUR SNIGIL FUNNIN Í FØROYUM".

Vit skrivaðu, at ein snigil, sum á látíni eitur Limax macimus - eisini kallaður "leopardsnigil", var funnin á Svangaskari á Toftum, og at hesin ikki var staðfestur her á landi áður!
Vit bóðu eisini fólki boða okkum frá, um tey kendust við snigilin.
Tað hevur síðan víst seg, at fleiri hava sæð hann; men í tí trúgv, at talan var um morsnigil, høvdu tey ikki víst honum stórvegis ans!
Sambært teimum, eg havi tosað við, er L. macimus funnin fleiri staðni í Suðurstreymoy heilt frá Kollafirði til Kirkjubøar. Somuleiðis er hann funnin í Eiði og ymisk onnur støð í Eysturoy.
Teir flestu av lesarunum halda, at tey ikki hava sæð hann fyrr enn í ár?

Tekstur til mynd: Limax macimus er fjølbroyttur á liti, eins og flest aðrir sniglar; men hesin er tann mest vanligi á Svangaskari.

Mynd: Marita Gulklett.